# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli:

## Jóhannes Eli nýggjur leiðari



Tórshavnar kommuna hevur sett Jóhannes Eli Iversen í starvið sum leiðari í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla frá 1. januar 2006.

Jóhannes Eli er 57 ára gamal, tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1972 og hevur verið lærari í Tórshavnar Kommunuskúla síðan tá, frá 2002 varaskúlastjóri. Harumframt hevur hann fleiri skeið m.a. í leiðslu og fyrisiting.

Umframt lærarastarvið hevur Jóhannes Eli verið lærugreinaráðgevi á Landsmiðstøðini 1989-96. Hann hevur eisini verið í nógvum nevndum, ið hava við skúlaskap at gera, t.d. lesi ætlanarnevnd og í nevndini, ið gjørdi álit um savnsrøkt.

Í 2001 varð Jóhannes Eli Iversen valdur í nevndina í Føroya Lærarafelag, har hann nú er næstformaður. Hann varð formaður 2003-05.

## Navnabroyting

Hanus Hansen, lækni, og Mildrid Einarsdóttir, sjúkrarøktarfrøðingur, Klaksvík, hava fingið sær eftirnavnið *á Lógv*. Tey eita nú Hanus á Lógv og Mildrid Einarsdóttir á Lógv.

**Dagurin í morgin**

**10. november. Luther.** Sjálvandi ikki komin í álmanakkarnar sum halgimenni, men dagurin er í luthersku kirkjuni settur sum minningardagur Luthers. Hann varð borin í heim 10. november í 1483 í Eisleben í Týsklandi.

## Annika Olsen á ting



Í døgunum 8. til 18. november tekur Annika Olsen sæti á løgtingi. Poul Michelsen, sum er umdømisvaldur fyri Fólkaflokkin í Suðurstreymoy er tá í farloyvi, og sum næsta valevni á listanum tekur Annika sætið hesar dagarnar.

Sosialurin Sosialurin i Sosialurin Sosialurin

# Sóknast eftir myndum av bussi í Vágum

**Í sambandi við søguskriving verður leitað eftir myndum av gamla Norðistovubussinum í Sørvági - ella bussinum hjá Henry - sum hann eisini varð nevndur**



Bussurin varð uppbygdur í smiðjuna hjá J. K. Joensen & soni í Miðvági fyrst í 60-unum fyri N. Niclasen í Sørvági. Seinni yvirtók Henry Davidsen í Sørvági bussin. Eina tíð átti Jógvan Hans Joensen í Miðvági bussin, ið hann seldi til Jógvan Martin Høj á Strondum, sum lakkeraði hann reyðan. Áður hevði hann verið bláur. Myndirnar skulu nýtast til søguna um bussin.



Tey, sum eiga myndir av bussinum - eisini tá hann stóð í gerð - eru vælkomin at seta seg í samband við Jens Jákup Hansen á tel. 221775.

## Havnar Arbeiðskvinnufelag skipar fyri sangkapping

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við at Havnar Arbeiðskvinnufelag verður 70 ár komandi ár, varð samtykt á seinasta aðalfundi at skipa fyri eini kapping um at skriva ein sang.

Evni er: Gerandisdagur tín, arbeiði og tað ið liggur tær nær.

Uppskot skulu sendast inn til Havnar Arbeiðskvinnufelag, Bøgøta 10, FO-100 Tórshavn, merkt: "Sangkapping", innan 6. Januar 2006.

Vinnararnir verða kunngjørdir á aðalfundinum. 1. virðisløn er 5.000 kr., 2. virðisløn er 3.000 kr. og 3. virðisløn er 2.000 kr.

Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsanir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**